

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 11 - 2011

# Lættari enn mett at byggja út í norðurhøvum

Tey mest dapurskygdu hava sagt, at tað fer ikki at loysa seg at fara eftir oljuni og gassinum í Barentshavinum og hinum norðurøkjunum, tí íløgurnar og raksturin fara at kosta meiri enn tað, sum kann fáast burturúr. Men hetta er als ikki so, sigur norska Petroleumtilsynet nú. Sagt varð, at kuldin, tann myrka tíðin og tann langi teinurin frá olju- og gassleiðunum inn á land settu heilt onnur krøv enn aðrastaðni so sum í Norðsjónum. Teir nógvu spádómarnir og tað nógva kjakið um hesi viðurskiftini gjørdu, at Petroleumtilsynet bílegði eina frágreiðing, sum skuldi byggja á veruleikan og veruliga vitan. Hon er nú komin. "Vit hava ikki funnið tær stóru bumburnar, sum kundu bent á, at vit ikki skulu byggja út í norði, sigur Kjell Gummar Dørum í Petroleumtilsynet við NTB. Hann ásannar, at sjálvandi eru avbjóðingar har norðuri, men at tøknin til at vinna á hesum avbjóðingunum er til taks. Stutt sagt avlívar frágreiðingin teir døpru spádómarnar um, at tað ikki ber til ella ikki loysir seg at byggja oljuvinnuna út í Barentshavinum og norðurøkinum annars", sigur hann. Tað eru Iris og lærdi háskúlin í Stavanger, sum hava skrivað ta nýggju frágreiðingina, ið hevur heitið «Tekniske og operasjonelle utfordringer ved petroleumsvirksomhet i nordområdene» .